

*Tað er eitt vælsignilsi at búgva mitt í býnum, at síggja kirkjuna og hoyra klokkuna ringja.Eg órógvist ikki av klokkuni, men um hon ikki ringir tá ið hon eigur, ja, so ringi eg til syskinabarnið Niels Juul Arge*

Vit gerast ikki mett av góðum ráðum

# Allir føroyingar eiga Jonhild

Hon er húsmóður og bestseljari. Góðaráð er í nærum øllum føroyskum heimum og millum sjómenn er Jonhild´sa bók eisini nógv brúkt. Tá ið fjórða upplag kemur út seinni í ár, eru heili 21.000 bøkur prentaðar av væl umtóktu kókibókini

*Orð: Steintór Rasmussen*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Tað er ein mildur roykur av karry í gongini. Hóast hon er 73 ár so ger hon hvønn dag døgurða til síni nærmastu. Í einum praktiskum hugnaligum køki hevur Jonhild stákast alt sítt lív. Uttan nakra kókioyggj ella glasplátur. Kortini er komfýrurin er aftaná 1987. Tá hevði gamli Ankersum tænt fyri seg og síni og ráð vóru at keypa eina nýggjan.

Jonhild er líka kring at siga frá sum at gera mat. Afturvið kaffinum serverar hon siropskøkur og eg kann vera vísur í at fáa mandluna.

Góðaráð skuldi verða liðug til 60 ára føðingardegnum hjá manninum Jósef Henriksen, 29. oktobur 1987. At fáa eina bók í føðingardagsgávu er ikki óvanligt, men 12.000 av sama slag, mundi sjálvt Jonhild halda vera í meiralagi at bera inn í kjallaran.

Aftaná at hava fyrireikað, savnað og skrivað í fleiri ár, sást úrslitið ein vakran fyrrapart í oktobur í túninum á Selheyggi. Fleiri plattar av bókum. Í tonsavís av uppskiftum um at gera drýl, baka bollar, kóka lunda, steikja fisk og hagreiða dunnu og havhest. Góð ráð til húsarhaldið og vanligir matuppskriftir, sum føroyingar hava gjørt fram til okkara dagar. Og sum Jonhild sjálv í køkinum á Selheyggi, við fýra kókiplátum og einum bakarovni, gjørdi til síni 190 góðaráð.

## Familjubók

Tað vóru børnini Jóhan og Petra, sum saman við mammuni mannaðu ritstjórnina og sum skipaðu fyri. Maðurin hjálpti at skriva og laga til og svágurin Jefri Henriksen kom við holari málsligari ráðgeving. Ræettirnir í bókini høvdu gentirnar á skúlanum roynt í verki. Men átti Jonhild uppskriftirnar í bókini, so var tað ikki hennara verk, at so nógvar bøkur vóru komnir til landið.

– Eg var um at missa mótið. Men móttøkan var ótrúliga góð, so børnini gjørdu ivaleyst rætt í at prenta eitt stórt upplag beinanvegin. Teir fyrstu tveir mánaðirnar vóru seldar 8.500 bøkur, og eg haldi at Niels Juul Arge systinabarnið, sum gav út vælumtóktu bøkurnar Tey bygdu land, var ikki sørt ovfarin. Hesi jólini mundi mín bók vera tann best seljandi.

## Ein dism av hesum

Jonhild skeinkir uppí koppin og eg fái mær hvíta rullukaku við sviskum uppá tallerkin, ein av mongu uppskriftunum, sum eru í bókini.

Eg vil siga, at bókin fyrst og fremst var gjørd til ungu genturnar sum vóru á Húsarhaldsskúlanum. Eg var í 1974 biðin um at geva frálæru í føroyskari matgerð á skúlanum og longu tá fór eg at hugsa um at gera eina kókibók. Hetta var annars beint aftaná at Marius Johannessen gav kókibókina Matur og Matgerð út, sum fekk sera góða móttøku kring alt landið. Men uttan at taka nakað frá Marius, so var hansara bók neyvan ætlað til skúlabrúk. Uppskriftirnar vóru í summum ikki nóg neyvar, ein dims av hesum og ein klíning av hasum, og føðslurokningar og myndir vóru heldur ikki vanligar tá.

## Húspláss hjá Amtmanninum

– Hvaðani eg havi fingið og lært uppskiftirnar?! Eg havi altíð havt áhuga fyri matgerð og havi lært nógv av mammu míni. Eisini havi eg altíð klipp uppskiftir úr bløðum og lært av egnum royndum.

Jonhild nevnir í hesum sambandi, at hetta at gera føroyskan mat, er ikki nakað tú hevur kunna tikið útbúgving í. Og tá ið hon var biðin um at undirvísa í Húsarhaldsskúlanum í matgerð og seinni gjørdist leiðari á skúlanum, so var tað ikki tí at hon hevði nøkur serlig pappírir.

– Nei, hjá mær man tað vera lívsins skúli. Men eg var í arbeiði hjá Amtmanninum sum ung, og hetta haldi eg gav mær førleika og sjálvsálit, sum er komið mær til góðar seinni í lívinum. Hon minnist aftur á bæði kongavitjan og tá Føroya Løgting fylti 100 ár. Eisini at tey hvønn hósdag fingu fisk úr Klaksvík. Jú, tað var ein og lærurík tíð, sigur Jonhild, sum á yngru árum eisini gjørdi sínar royndir at ansa barnakonum.



*Jonhild, sum í dag er einkja, ger framvegis mat til fleiri. Oftast er tað nærmastu, sum njóta gott av at hava ein so dugnaliga kokk í familjuni.*

## Mynd av toskarhøvdi

Jonhild heldur at tað hevði ómetaliga stóran týdning fyri bókina, at hon var prýdd við myndum av øllum uppskriftunum.

– Heilt erligt, so helt eg tað vera eitt sindur óneyðugt at filma eitt kokað toskarhøvd, sum ikki gerst vakrari aftaná at tað hevur verið í grýtuni. Men myndir skuldu verða av øllum rættum og torskarhøvdið varð avmyndað áðrenn tað fór í pottin.

Allir rættirnir vóru gjørdir yvir tveir dagar heima við hús hjá Jonhild. Síðani varð alt pakkað niður og koyrt til Havnar, har Per á Hædd tók myndirnar, sum prýddu og gjørdi bókini til nakað heilt serligt.

Jonhild ásannar at bókin Góðaráð var eitt tak av teimum stóru. Hon byrjaði uppá arbeiði í 1984 og ikki fyrr enn í 1987 var komið undir land. Øll familjan hjálptu til at gera dreymin til veruleika. Nógv tilfar skuldi savnast, føsluvirði skuldi roknast út, uppskiftirnar skuldu roynast, myndir skuldu takast, nógvar síður skuldi skrivast og lesast rætt. Og harafturat er nógv arbeiði og umsiting av einari sølu, sum í dag togar upp ímóti 18.000 bókum.

## Har kemur millióningur

– Jú tað eru nógv sum munnu halda at vit eru vorðin rík av bókini. Sjálvandi verður eitt sindur eftir tá ið sølan er góð, brosar ein vælnøgd Jonhild og fortelur víðari.

– Eg minnist stutt aftaná at bókin var útkomin, ein dagin eg kom í kirkjuna og presturin Bøgesvang stóð og prátaði við nøkur fólk. Tá eg gangi framvið letur í honum. "Hygg har kemur okkara nýggi millióningur. Men vit síggja tað ikki á henni, at hon er vorðin so rík og kend."

– Jú, tað kann vera at eg eitt skifti nærum var verðinsberømt í Føroyum. Men, hóast vit hava selt nógvar bøkur, so er tað kortini ikki tann stóra tímalønin. Góðaráð var ein dýr bók at gera, og vit fingu alt goldið uttan fíggjarligan styrk. Av avkastinum blivu ráðini betri at keypa nýggjar hvítvørur og okkurt annað sum trongdi til. Men eg eri mest av øllum glað fyri at bókin kom út og fekk dygga undirtøku millum føroyingar heima og í útlandinum, fiskimenn og ikki minst í skúlunum.

## Lætt og leskiligt í jólagávu

Jonhild blaðar í einari nógv slitnari bók og steðgar á við dunnuna.

– Ein maður ringdi til mín og segði, at hann var ógvuliga glaður fyri at bókin var komin í hendurnar á konu hansara, tí nú fekk hann aftur dunnur uppá góðan gamlan máta. Soleiðis sum mamma hansara plagdi at gera jóladøgurðan.

– Eg havi varhugan av, at nógvir menn eisini hava gjørt nýtslu av bókini, sigur Jonhild Henriksen og fotografur, sum er nú eisini er tilstaðar, nikkar samtykkjandi.

– Sjálv havi eg bert onkra hendinga bók eftir, men skjótt verður eitt nýtt upplag uppá 3000 eintøk prentað. Tað er hugaligt, heldur Jonhild, sum er stolt og glað yvir, at hennara bók framvegis eigur pláss í føroyska køkinum. Og hon hevur tað bara gott við, at onnur royna at gera henni bragdið eftir. Hennara partur liggur so ikki eftir.

Børnini hjá Jonhild fingu øll Lætt og Leskiligt í jólagávu.



*Jonhild blaðar í Góðaráð, sum er tann bókin, ið aftaná Bíbluna hevur slet mest í Føroyum*